# 60 ungdómar við sjónleiki

**Í annaðkvøld verður frumsýning av leikinum »Kennir tú Margar«, sum starvsfólk á Margarinfabrikkini saman við millum 50 og 60 ungdómum seta upp í størsta tiltaki av sínum slag hjá ungdómshúsinum**

Leo Poulsen

Í einar tveir mánaðir hava millum 50 og 60 ungdómar trúliga bygt upp ein sjónleik frá grundini av. Og í annaðkvøld upprennur so løtan, tá spentu ungdómarnir sleppa at vísa almenninginum fyri fyrstu ferð úrslitið av mánaðar venjing.

– Tað var í januar, at stig vórðu tikin til at seta ein leik upp. Upprunaligi tankin var, at talan skuldi verða um ein leik, sum vit kundu fara niður til Danmarkar við, men undirtøkan gjørdist so stór, at vit skjótt broyttu hugsan, sigur Beinta Clothier, sum er útbúgvin sjónleikari og arbeiðir á Margarinfabrikkini.

Saman við Gunn Joensen, ið koreograferar dansin í leikinum, og Petur Háberg, ið hevur gjørt tónleikin, stendur Beinta Clothier fyri uppsetingini, sum skjótt gjørdist munandi størri enn roknað var við.

– Tað var so skjótt at vit funnu út av, at tað gav lítla meining at fara niður við einum leiki, har danir ikki skilja eitt orð, samstundis sum vit í staðin kundu hava fleiri framførslur í Føroyum, sigur Beinta Clothier.

Leikurin er ein dansi- og sangleikur, og er sprottin av tí, ið rópt verður »deviced theatre«. Tað vil siga, at byrjað verður á berum, og so verður leikurin bygdur upp í tøttum samstarvi millum leikarar og leikstjóra – og í hesum føri koreografi og tónasmiði eisini.

Leikurin er bygdur upp um nøkur ítøkilig evni, Forelskilsi/Hjartasorg – Yvirstremban – Hjúnaðaskilnaður - Keðsemi - Bólkurin mótvegis tí einstaka.

– Hetta eru tey evni, ið verða viðgjørd í leikinum, men tað er kortini eingin reyður tráður, heldur einstakar senur, sigur Beinta Clothier.



*Ein brotpartur av teimum millum 50 og 60 ungdómunum, sum eru við í sangleikinum Kennir tú Margar. Margar er ein stytting av Margarinfabrikkini – harav navnið*

Mynd: Álvur Haraldsen

## Ungar yrkingar

Sum sagt er leikurin bygdur upp í samstarvi millum leikarar og leikstjóra, eins og koreografur og tónasmiður hava havt stóran týdning.

Fimm sangir eru í leikinum, og tað er Petur Háberg, ið hevur gjørt tónleikin. Yrkingarnar hinvegin eru skrivaðar av teimum leikandi, og tað má kallast áræði. Tey, ið eru við í leikinum, hava ikki tær drúgvu royndirnar á palli, tó at onkur av tónleikarunum hevur roynt tað fyrr.

Tað er fyri tað mesta ungdómar, sum javnan ganga í Margarinfabrikkina, ið eru við í leikinum, men úr ungdómshúsinum hava tey eisini verið úti í framhaldsdeildunum og greitt frá.

– Talan er um breiðan hóp av ungum, ið eru millum 14 og 18 ár. 13 tónleikarar eru, 14 dansarar og nóggju sjónleikarar. Restin tekur sær av ljósi, ljóði, búnum, palli, smyrsli og annars tí, sum brúk er fyri back-stage, sigur Beinta Clothier.

Fyrireikingarnar byrjaðu í januar, men sjálv venjingin byrjaði tó ikki fyrr enn fyri tveimum mánaðum síðani.

– Tá páskafríðtíðin er tikin burtur úr, hava vit vant í einar seks vikur, har serliga seinastu vikurnar hava verið hektiskar sum altíð upp undir eina frumsýning, sigur Beinta Clothier.

## Góðan stuðul

Leikararnir hava víst sera stóran áhuga fyri verkætlanini.

– Tað hevur alla tíðina verið soleiðis, at tað eru leikararnir, ið hava trýst leikstjórarnar heldur enn øvugt. Leikurin hevur verið borin av einum vilja at fullføra verkið, og tað hevur í høvuðsheitinum verið tey, ið hava skapt leikin, sigur Beinta Clothier.

Tað er Perlan, ið er karmurin um leikin fyrst og fremst, men í prinsippinum ber til at ferðast við honum.

Fyribils er ætlanin at sýna »Kennir tú Margar« í Perluni, og ein vika er sett av frá leygardegnum. Tó verður eingin sýning mánadagin. Og áhugin fyri leikinum er stórur, tí útselt er til tvær sýningar umframt frumsýningina.

– Ein vika er sett av, men møguleiki er at sýna leikin nakrar ferðir aftrat. Kommunan hevur víst verkætlanini sera stóran áhuga, og vit hava eisini fingið stuðul frá Mentanargrunninum og MáF, og tað eru vit sera takksom fyri, sigur Beinta Clothier.

Flestu leikarar ganga í skúla, og tí hevur bert verið møguligt at vant eftir skúlatíð, men væl hevur gingist í hond, og nú bert eitt samdøgur er eftir til frumsýningina, er alt til reiðar.

Sum nevnt verður frumsýningin í annaðkvøld, leygarkvøldið 7. mai, og atgongumerkið kostar 100 krónur. Síðani verður leikurin sýndur eina viku fram, tó ikki mánakvøldið, og øll kvøldini verður byrjað klokkan 20. Og tað er eitt gott hugskot at skunda sær at keypa atgongumerki, tí pláss er bert fyri 40-50 áskoðarum.